VIÐMERKINGAR

# Tá ein politiskt livir við og av eini 0-loysn

POUL MICHELSEN
løgtingsmaður



Nú er skjótt nóg mikið av tíð og orku brúkt uppá at hyggja afturlítandi – stundin er komin at hyggja fram. Tó vil eg enda hetta kjaki við hesum viðmerkingum.

Tjóðveldisflokkurin sat í 6 ár og í allarbestu búskapartíð við ábyrgdini av at loysa hølistørvin hjá tekniskaskúla, handilsskúlanum og studentaskúlanum í Havn. Onki kom burturúr – eyðsæð er nú, at hetta skyldast innanhýsis klandri í Tjóðveldisflokkurin um skúladepilin í Marknagili.

Nú er málið tikið úr hondum tjóðveldisflokksins og loyst.

Tjóðveldisflokkurin sat við politiska valdinum í mentamálum í 6 ár. Talan er um 6 feit búðskaparlig ár, og talan er um eina tíð, har hølisviðurskiftini hjá tekniska skúla, handilsskúlanum og studentaskúlanum vóru kaotisk.

Onki kom burturúr, og hølisviðurskiftini til miðnámsútbúgvingar í Havn eru av somu orsøk út av lagi vánalig. Avleiðingin er, at eitt stórt tal av næmingum ikki sleppa inn á skúlarnar at nema sær ætlaða útbúgving.

Hetta er vónandi tað, sum nívur tjóðveldisflokkin ídag.

Tey, sum hava fylgt við skúladepilsmálinum, kunnu síggja, at orsøkin fyri at onki kom burturúr hesi 6 ár einamest skyldast innanhýsis klandur í Tjóðveldisflokkinum. Klandur um hvør skúli skal inn í depilin í Marknagili, hvussu skúlarnir skulu skipast, hvussu teir skulu fíggjast o.s.v.

Fólkaflokkurin hevur í hvussu so er gjørt sítt, fyri at miðnámsskúlarnir skuldu fáa sín tørv nøktaðan.

Nú er so málið um skúladepilin í Marknagili tikið úr hondum Tjóðveldisfloksins og loyst.

At Tjóðveldisflokkurin politiskt kann liva við eini O-loysn er sjón fyri søgn. Men fólkaflokkurin hvørki kann ella vil góðtaka slíkt.

Tó skal eg takka teimum 3 tjóðveldistingfólkum, sum til 3. viðgerð atkvøddu fyri skúlabygginingini í Marknagili.

### Ein lýsing og ikki eitt projekt

Í eini roynd at vísa á, at ikki heilt onki kom burturúr, tá tjóðveldisflokkurin sat við mentamálum, hevur Annita á Fríðriksmørk fleiri ferðir víst á, at eitt fullfíggja projekt fyrilá, tá henda samgonga tók við, og alt var klárt at byrja. Eisini her fer Annita lætt um sannleikan – talan er um eitt skitsuprojekt, sum lýsir hølistørvin hjá skúlunum.

Projektið var hvørki arkitektoniskt, tekniskt ella búðskaparliga gjøgnumarbeitt. Talan var og er um eina lýsing av skúlatørvinum hvørki meir ella minni.

Fyrireikingararbeiðið er tó á ongan hátt burturspilt. Sjálvt um studentaskúlin ikki er við í fyrsta umfari, so er samtykt, at ætlanin skal taka hædd fyri,at hesin kann flyta inn í depilin í Marknagili seinni.

### Trætar við seg sjálvan

Tað kennist eitt sindur løgi at tjóðveldisflokkurin, sum varðar av lógini Yrkisskúlar frá 1998, trætar við seg sjálvan, um lógin sum er gjørd til yrkisskúlar skal brúkast til yrkisskúlar.

At ein kann gera sær so stórar trupulleikar er ófatiligt. Um vit lesa lógartekstin og viðmerkingarnar, so síggja vit, at lógin er býtt upp í 6 kapitlar. Kapitlarnir umfata : Góðkenning av yrkisskúlum, leiðsluviðurskifti, stuðul, roknskapur og grannskoðan, ymsar ásetingar og gildissetan. Eitt væl greinað lógarverk, sum saman við viðmerkingunum greitt lýsir, at júst henda lógin er gjørd til endamálið – nevnliga at fíggja sjálvsognarstovnunum sum byggja og reka yrkisskúlar í Marknagili.

Enntá er lógin soleiðs orðað, at hon tekur hædd fyri, at kommunan kann luttaka í verkætlanini. Og hetta verður neyðugt, um byggingin skal gerast veruleiki.

So meðan Tjóðveldisflokkurin trætar við seg sjálvan um yrkisskúlalógin kann brúkast til yrkisskúlar ella ikki, byggja vit skúladepil í Marknagili.

### Seinasta hondgranatin

Undir viðgerðini í tinginum fann tjóðveldisflokkurin eitt nýtt politiskt vápn at steðga depilsætlanini. Karsten Hansen hevði funnið út av, at byggingin kom at kosta munandi meira, um bygt varð eftir lógini um yrkisskúlar.

Víst var á, at bankaráðgevarar høvdu roknað út, at rentukostnaðurin kom at verða einar 60 – 70 mill. krónur størri enn neyðugt.

Tjóðveldisflokkurin brúkti ein heilan seinnapart at føra henda pástand fram. Eftir tógvið stríð eydnaðist at sannføra tjóðveldistingfólk um, at talan varð um ein roknifeil uppá útvið 50 mill - alt eftir hvussu nettorenturoknstykki sær út.

Ein kann undra seg yvir, hví so kreativur rokniháttur skal hálast úr skuffuni – men tá vanlig argumentir ikki røkka longur - verður í neyðini so nógv nýtt.

Samanumtikið kann sigast, at skúladepilin í Marknagili ikki hevur styrkt um trúðvirði hjá Tjóðveldisflokkinum, og eg havi ilt við at síggja, hvat endamálið hjá flokkinum er, men fakta er, at øll stig tikin av tjóðveldisflokkinum í hesum máli - vildu forkomið skúladeplinum í Marknagili.

At Sjálvstýrisflokkurin og Miðflokkurin eisini vendu skúladeplinum í Marknagili bakið er at harmast um, men frá teimum varð ikki roknað við so stórari hjálp.

### "Tavshed er guld"

Haldi als ikki at Finnur Helmsdal er Havnini fíggindaliga sinnaður – tvørturímóti.

Tó koma vit ikki uttanum, at Finnur – eins og floksfelagar hansara - í hesum málinum um skúladepilin í Marknagili, ikki hava verið positivir.

Sjálvsagt skal ein tingmaður hava eina meining um flest øll mál, men um ein ikki er nóg væl kunnaður um málið – ber til at vera meira varðin.

Tað haldi eg, at Finnur skuldi hugsa um tá hann – mitt undir viðgerðini av skúlabyggingini í Marknagili - valdi at stuðla Tobba í at flyta Tekniska skúla til Klaksvíkar.

Kanska var betri at tagt – ella ?

Hetta verða seinastu viðmerkingar mínir um skúladepilin í Marknagili á hesum sinni – nú er at hyggja fram og brúka teir møguleikar, sum løgtingslógin nr 112 frá 5. mai, 2006 hevur givið okkum.

# Almannastovan og rúmligi arbeiðsmarknaðurin

PETRA JOHNSDÓTTIR JOENSEN
stjóri á Almannastovuni



Hesa seinasta tíðina hevur av álvara verið varpað ljós á viðurskifti og umstøður hjá teimum, sum vegna skerdar førleikar hava tørv á almennum fyriskipanum bæði til arbeiði og til bústað.

Við ráðstevnum, fyrilestrum, blaðgreinum og lýsingarátøkum hava felagskapir gjørt eitt stórt arbeiði til tess at vísa á, at nógv er eftir at gera fyri at tryggja øllum eitt pláss á arbeiðsmarknaðinum. Eisini hevur verið víst á, at bústaðarmøguleikarnir hjá fólki við skerdum førleikum sum heild eru ov vánaligir.

Sum stjóri á Almannastovuni fegnist eg um, at hesi evni verða tikin upp, tí henda viðgerð er neyðug. Øll kunnu vit koma fyri hendingum, sum fullkomiliga broyta okkara umstøður og møguleikar at virka og liva sjálvbjargið í samfelagnum. Onnur eru født við skerdum virkisevnum likamliga og/ella sálarliga.

Arbeiðið og bústaður eru sera týdningarmiklir partar av sjálvsvirði hins einstaka, og semja er um, at í Føroyum skulu øll hóast skerdar førleikar hava møguleika fyri arbeiði, útbúgving og bústaði, sum í mest møguligan mun eru tillagað ítøkiligu umstøðunum hjá tí einstaka.

Til tess at røkka hesum málum eru settar í verk fleiri almennar skipanir. Almannastovan umsitur nakrar teirra, eitt nú endurbúgvingarstuðul og skipan av vardum størvum. Tá um bústaðarviðurskifti viðvíkur, so umsitur Hjálpartólamiðstøðin, sum er stovnur undir Almannastovuni, stuðul til bústaðarbroytingar.

Tá umstøðurnar hjá teimum, ið hava skerdar førleikar, verða settar á dagsskránna, verður samstundis ofta funnist at Almannastovuni. Tó at fleiri sólskinssøgur eru at finna, so verður ofta víst til ítøkilig dømi um persónar, sum kenna seg illa viðfarin av almannaverkinum. Lagt verður eisini eftir arbeiðinum hjá starvsfólki á stovninum, ið antin ikki duga ella skilja veruligu støðuna hjá viðskiftafólkinum, sum tí metir seg ikki fáa tað neyðugu hjálpina.

Almannastovan er ikki lýtaleys, treyðugt so, men eg haldi, at atfinningarnar móti starvsfólkunum ikki altíð eru rímiligar. Almannastovan kann sum aðalregla ikki gera viðmerkingar til ítøkilig persónsmál alment, og avleiðingin av hesum er, at tá ið mál verða tikin fram í fjølmiðlunum, so verður bara onnur síðan av søguni lýst. Hetta fær tó ikki verið stórt øðrvísi.

Fyri 5-6 árum síðan fór Almannastovan undir eina miðvísa ætlan at menna allar tættir í umsitingini. Samlaða tænastutøðið skuldi hækkast, og sum liður í hesum vórðu umfevnandi bygnaðarbroytingar framdar á stovninum til tess at koma nærri borgarunum. Skipað varð fyri førleikamenning av starvsfólki, og mannagongdirnar vórðu endurskoðaðar. Harumframt eru fleiri framtøk gjørd til tess at veita viðskiftafólki og almenningi fjøltáttaða vegleiðing og kunning um rættindi til almannaveitingar bæði um heimasíðuna, við kunningarriti og persónligu vegleiðingini.

Eg kann nú staðfesta, at Almannastovan innan givnu fíggjarligu karmar er komin langt, og at umsitingin og tænastan eru munandi ment farnu árini. Hetta er ikki minst starvsfólkunum fyri at takka. Tey stremba hvønn dag eftir at veita øllum viðskiftafólkum eina so góða, viðkomandi og rætta tænastu sum gjørligt.

Tá funnist verður at Almannastovuni serliga í sambandi við arbeiðið við rúmliga arbeiðsmarknaðinum og bústaðarbroytingum, sum dømi hevur verið um herfyri, so eru hetta øki, ið Almannastovan annars hevur raðfest høgt og lagt nógva orku í at styrkja.

Sum heild kann eg eisini staðfesta, at úrslitini av miðvísa arbeiðinum á hesum økjum hava verið góð. Hesi seinnu árini er t.d. talið av fólki í endurbúgving í støðugum vøkstri eins og talið av vardum størvum er vaksandi um alt landið.

Eisini viðvíkjandi stuðli til innrætting og tillaging av bústaði eru fleiri umsitingarligir batar framdir – mannagongdirnar eru gjørdar munandi smidligari serliga við atliti at teimum ynskjum, sum viðskiftafólkini hava til bústaðin, har Hjálpartólamiðstøðin í samráði við viðskiftafólkið arbeiða fyri at finna bestu loysnirnar.

Vit arbeiða tó altíð við at gera tingini betri, tí sannroynd er, at vit ongantíð koma á mál, men alla tíðina mega seta okkum nýggj mál. Í sambandi við rúmliga arbeiðsmarknaðin hevur Almannastovan tí sett út í kortið ymsar menningarætlanir, og sum eisini eru í samsvari við yvirskipaðu politisku ætlanirnar í Visjón 2015.

Hesar ætlanir miða eftir, at Almannastovan í nógv størri mun enn nú leitar upp almennar sovæl sum privatar arbeiðsgevarar bæði at kunna um og seta í gongd vard størv ella aðrar tíðaravmarkaðar royndarverkætlanir í samstarvi við arbeiðsmarknaðin.

Ein annar sera týðandi táttur í ætlanunum er at skipa fyri ítøkiligum innsatsi við tí endamáli at fasthalda fólki í arbeiðinum, tey hava, tá ið tey fáa skerdan arbeiðsførleika. Við ítøkiliga at ráðgeva og vegleiða bæði lønmóttakaran og arbeiðsgevaran um møguleikar fyri tillagingum eitt nú av arbeiðsuppgávum, innrætting av arbeiðsplássi, umskúling v.m. kann Almannastovan á henda hátt vera við til at tryggja lønmóttakaranum eina framhaldandi tilveru á arbeiðsmarknaðinum.

At fremja hesar ætlanir krevur eyðsæð eyka starvsfólkaorku til stovnin, tó at viljin ikki trýtur. Men tað er mín vón, at umstøðurnar hjá fólki við skerdum førleikum áhaldandi verða hildin í fokus, so at myndugleikar og samfelagið annars kunnu fáa nýggja vitan og íblástur til at taka tey tøk, ið kunnu vera við til at lyfta alt økið upp.

Luturin hjá Almannastovuni fer ikki at liggja eftir.

Tórshavn, 10. mai 2006